

# 500 fólk tóku ímóti Baki og Stelki

**– Vit høvdu ikki torað at droymt um, at skipini fóru at fáa eina so stórfingna og virðiliga móttøku, sigur Ragnar Olsen hjá P/F Beta**

NÝBYGNINGAR
*Vilmund Jacobsen*

Tað var ein rættilig stórhending í Runavíkar kommunu sunnudagin kl. 14, tá ið nýggju skipini hjá P/F Beta í Saltangará, Bakur og Stelkur, løgdu til bryggju.

Hópur av fólki var samankomin at taka ímóti. Eingin nýbygningur er komin til kommununa seinastu 16 árini, so spenningurin var stórur, nú hesi snotuligu skip endiliga vóru komin í havn.

Leystligar metingar siga, at talið av vaksnum og børnum, sum vildu heilsa skipi, manningum og reiðaríi, ikki var minni enn 500, og tað má sigast vera ein rættilig móttøka.

Á Beta siga tey, at tey vóru ovfarin. Tey høvdu ikki torað at droymt um, at skipini fóru at fáa eina so stórfingna og virðiliga móttøku.

Hátíðarhaldið var sett til at vera kl. 14, men skipini vóru komin inn undir land í góðari tíð.

Skipað varð so fyri, at tyrlan við tveimum myndamonnum fleyg yvir Baki og Stelki eina góða løtu, meðan tey lógu og mólu runt inni á Skálafjørðinum og "bíðaðu" eftir klokkuni.

## Hornatónleikur

Hornorkesrtrið setti sín hátíðarliga dám á løtuna, og býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, helt røðu.

Reiðarin, Olaf Olsen, takkaði fyri stórfingnu móttøkuna. Hann beyð manningunum væl afturkomnum, takkaði føroysku útvegarunum fyri arbeiði, teir hava gjørt, og bjóðaði síðan øllum, sum samankomin vóru, umborð at síggja skipini. Eisini bjóðaði hann til ábit í hølunum hjá reiðarínum.

Tá ið løtan kom, fóru bæði vaksin og børn umborð, og so nógv fólk var á bryggjuni, at øll sluppu ikki umborð í senn. Onkur fór tí fyrst til ábit og fór síðan umborð, tá ið onnur vóru farin í land aftur.

Mett verður, at fleiri hundrað nýttu høvi at síggja skipini.

Fólk vóru hugtikin av skipunum og umstøðunum hjá manningunum, sum á ongan hátt kunnu samanberast við umstøðurnar umborð á gomlu skipunum, sum nú fara úr flotanum, Munki, Skúgvi og Grælingi.

Ein Cuba-bátur verður nú stakur við fiskiloyvi; tað er Havhestur, sum í fyrstu syfti verður stand-by skip hjá onkrum av hinum skipunum hjá felagnum, um okkurt verður áfatt.

## Somu manningar

Skiparar við Baki og Stelki verða Ólavur Samuelsen og Kjartan Egholm. Manningarnar verða í fyrsta lagi tær, sum vóru umborð á Gorpi og Skrápi, sum hesir báðir sjógarparnir hava ført.

Sjey mans verða við hvørjum trolara.

Ragnar Olsen væntar, at sum frá líður verða tríggjar manningar knýttar at nýggju skipunum, men væntast kann, at verandi manningar verða rættiliga støðugar umborð í byrjanini, nú alt er nýtt, spennandi og avbjóðandi.

Í byrjanini verður avloysingin nokk ikki so formell, sum Ragnar tekur til, men væntast kann, at avloysararnir í størstan mun verða kend andlit í reiðarínum.

Spurdur, nær skipini fara til fiskiskap, sigur Ragnar Olsen, at ætlanin er at loysa í kvøld.

- Okkurt smávegis er eftir at justera, og í hesum førinum er talan um útbúnað, sum maskinverkstaðurin, FJM, hevur staðið fyri, sigur hann.

Seinastu nýbygningarnir, sum komnir eru til Runavíkar kommunu, vóru Jaspis og Ametyst. Báðir eru bygdir í 1986. Tann fyrri kom í mars; hin kom við ársenda sama ár.





# Vit vilja sleppa avstað sum skjótast

**- Umstøðurnar umborð á Baki og Stelki kunnu á ongan hátt samanberast við umstøðurnar umborð á gomlu skipunum, sigur Ólavur Samuelsen, skipari, sum hevur ført Gorp í fleiri ár**



*Skipari og stýrimaður, Ólavur Samuelsen og Róin Joensen. Tveir aðrir stýrimenn, sum verða við nýggju trolarunum, eru Rúni Samuelsen, sonur Ólav og Jákup Pauli Egholm, sum er beiggi Kjartan Egholm.*

NÝBYGNINGAR
*Vilmund Jacobsen*

Víkarmaðurin, Ólavur Samuelsen, sum býr í Elduvík og streymnesmaðurin, Kjartan Egholm, sum býr á Eiði, verða teir, sum skulu føra nýggju skipini hjá P/F Beta, Bak og Stelk.

Báðir hava teir verið í Spaniu í ein mánaða, meðan seinasta hondin er løgd á skipini.

Ólavur sigur, at heimferðin, sum tók 5 samdøgur, gekk uppá stás.

- Vit vóru seks mans umborð á hvørjum skipi; veðrið var gott, og alt gekk, sum tað skuldi.

Spurdur, hvussu skipini royndust í sjónum, sigur hann, at tey bóru seg væl, men við tað, at veðrið var so gott allan vegin, fingu teir ikki roynt, hvussu skipini roynast í sjaskveðri.

- Vit høvdu einaferð loringsvind, og eina aðru ferð lá hann framman tvørs á bakborðsbógvin, og eg haldi avgjørt, at skipini fóru væl við sær, sigur Ólavur.

## Góð skip

Hann sigur, at bæði skiparum og manningum dámar bátarnar væl, og allir eru ógvuliga spentir at sleppa avstað.

- Og vit vilja sleppa avstað sum skjótast, leggur hann dent á.

Ólavur vísir á, at umborð á gomlu skipunum høvdu skiparar og stýrimenn hvør sítt kamar; síðan hevði manningin 2-3 manskømur.

- Men umborð á Baki og Stelki hevur hvør maður sítt kamar við brúsu og wc, og stykk eru bæði til sjónvarp, útvarp og teldu.

Hann vísir á, at eisini arbeiðsumstøðurnar umborð eru heilt øðrvísi og nógv betur enn umborð á gomlu skipunum.

- Maskinverkstaðurin, FJM, hevur sett eina kryvjilinju upp umborð, og vit eru ógvuliga spentir at vita, hvussu hon fer at rigga - og líkt er til, at hon fer at rigga væl, leggur Ólavur aftrat.

## Ískrapi

Eitt annað, sum eisini er ein stór broyting við Baki og Stelki er, at fiskurin nú verður køldur við ískrapa og ikki vanligum ísi

- Vit hava tveir tangar, sum eru 5 tons hvør. Tá ið vit fara avstað, fylla vit uppí tangarnar, og tá tekur tað tríggjar tímar, til ískrapan er klár.

Á brúnni hava skipini alla vanliga útgerð, sum nýggj skip hava í dag.

- Jú, vit eru ógvuliga spentir og vóna sjálvsagt, at alt fer at gangast væl, sigur Ólavur Samuelsen, skipari.



## Nøvnini, Bakur og Stelkur, ikki tilvildarlig

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nøvnini á nýggju skipunum hjá P/F Beta í Saltangará, Bakur og Stelkur, hava sínar røtur nøkur ár aftur í skipasøguna.

Navnið, Bakur, er gamalt navn hjá Skipafelag Føroya, haðani Beta hevur sín uppruna. Stelkur var navnið á tí níggjunda Cuba-trolaranum, sum í sínari tíð varð seldur úr felagnum, tá ið skipini komu til landið í 1977. Stelkur varð seldur bretskum felag, og endaði sum kavaraskip í oljuvinnuni í Persaraflógvanum.

# Føroyskir útvegarar til Bak og Stelk

NÝBYGNINGAR
*Vilmund Jacobsen*

Olaf Olsen, reiðari, sigur, at ein stórur partur av útgerðini umborð á nýggju trolarunum hjá er føroysk.

- Fiskireiðskapurin er føroyskur; hann hevur trolvirkið, Vónin, latið, og radioútgerðin er keypt frá Radiohandlinum í Saltangará. Haraftrat hevur maskinverkstaðurin, FJM í Runavík, bygt og sett arbeiðsdekkið upp og somuleiðis bondini, sum føra fiskin niður í lastina, sigur reiðarin.

Nýbygningarnir eru 38 metrar langir og 9,5 metrar breiðir. Teir eru merktir 462 bt., og maskinorkan er 1305 hk.

- Gomlu skipini eru á leið somu longd sum tey nýggju, men eru merkt 388 bt., sigur Olaf Olsen, reiðari.




*- Tað er ógvuliga spennandi at hava fingið tvey nýggj skip, sigur Olaf Olsen, reiðari*